**Nr. 27/2016**

**Jørgen Niclasen**
**løgtingsmaður**

**Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a**

**Fyrispurningur um Vágatunnilin, settur Aksel V. Johannesen, løgmanni (at svara skrivliga eftir TS § 52a)**

1. Verður ársaðalfundarsamtyktin hjá p/f Vágatunlinum frá í fjør, førd út í lívið í morgin, 10. desember 2016.
2. Nær kunnu kommunurnar í Vágum og lokalu valfeløgini vænta at hoyra frá løgmanni?
3. Verður frá sunnudegnum 11. desember ókeypis at koyra í Vágtunlinum, eins og tað er ókeypis í øllum 18 tunlunum, sum Landsverk umsitur?
4. Hvussu nógv hava brúkararnir av Vágatunlinum goldið tilsamans øll árini, síðan tunnilin læt upp?

**Viðmerkingar**:

Í morgin, 10. desember 2016, er Vágatunnilin útgoldin, og eisini er peningur tikin inn til at dagføra tunnilin við. Á ársaðalfundi í fjør var samtykt, at tunnilin skuldi latast landinum í ár á 14 ára føðingardegnum hjá tunilinum. Nevndarformaðurin fyri tunnilin segði á tí aðalfundinum, at tað alla tíðina hevði verið teirra greiða mál og fatan, og tí vórðu bummgjøld eisini løgd eftir tí.

Tá skuldi verða ókeypis at koyra, júst sum politiska avtalan alla tíðina hevur verið. Sum skilst, hevur núverandi landsstýrimaður hjá Javnaðarflokkinum havt ætlanir um at broyta hesa avgerð. Vónandi ætlar landsstýrið ikki at gera Vágatunnilin til eina avgjalds mjólkimaskinu hjá landsstýrinum. Í dag er alt goldið, og um landsstýrið sunnudagin 11. desember 2016 krevur gjald fyri at koyra í Vágatunlinum, er talan um nýtt avgjald til ovurnýtslu hjá hesi skatta- og avgjaldssamgonguni. Um so er, er meira enn ivasamt, við hvørji heimild landsstýrið kann áleggja einum vegastrekki í landinum at vera almenn mjólkimaskina.

Í vár vóru kommurnar í Vágum og politisku valfeløgini á fundi við løgmann um Vágatunnilin. Løgmaður lovaði tá at venda aftur við eini loysn áðrenn 1. oktober. Nú jólahalgan stundar til, er enn einki komið frá løgmanni.

**Á Løgtingi, 9. desember 2016**

Jørgen Niclasen